# Ársveitslan

**hjá Landsfelag Pensjónista**

Leygardagin tann 28. oktober 2006 kl. 17.30 til 24.00 verður ársveitslan hildin á Hotel Føroyum.

Tey, ið ætla sær í veitsluna, skulu tekna seg hjá sínum lokalfelag og gjalda har. Kostnaðurin er kr. 200,- pr. luttakara.

Atgongumerki er samstundis lutaseðil.

Seinasta freist at tekna seg er mánadagin 23. oktober.

**Nevndin**

*Niðanfyristandandi lýsing varð umbiðin at koma í blaðið mánadagin 9. oktober. Av misgáum kom hon ikki í blaðið og tekur Sosialurin ábyrgdina av hesum.*

# Ársaðalfundur

Pensionistafelagið í Havn hevur ársaðalfund í Losjuni, Tinghúsvegur 18, mikukvøldið 25. oktober kl. 19.00.

Dagsskrá sambært §11 í lógum felagsins.

**Nevndin**

**Aglowfundur verður í:**
**Miðlahúsinum í Vágsbotni**

Leygarkvøldið 21. oktober kl.19 30.
Birgit Thomsen leiðir sangin og Elin Tausen talar

*Vit gleða okkum at síggja teg.*

AGLOW
**Aglow í Havn**
www.aglow.fo

Sosialurin
www.sosialurin.fo



# Arbeiðsleiðari til Tvøroyrar Kommunu

Tvøroyrar Kommuna søkir eftir arbeiðsleiðara til anleggsdeildina.
Tekniska deild ætlar at menna anleggsdeildina, við at fáa arbeiði í sambandi við viðlíkahald og nýgerð av vegum, kloakkum, reinhald, fríðkan av økjum v.m. hjá kommunini, lagt í eina fast skipan.

**Arbeiðsuppgávur**
Undir leiðslu av teknisku deild, fyriskipar og røkir arbeiðsleiðarin hesar uppgávur:

- stendur fyri og hevur rakstrarábyrgdina av viðlíkahaldi og útbygging av anleggsdeildini
- hevur dagligu leiðsluna av viðlíkahaldi og nýgerð av vegum, kloakkkervinum, fríðkan av økjum, reinhaldi v.m. um hendi
- hevur umsitingarligu ábyrgdina av amboðum, maskinum o.a. ið eru knýtt at anleggsdeildini
- luttekur í skráseting av vegum og kloakkleiðingum

Talan er um eitt spennandi og sjálvstøðugt starv við møguleika fyri fakligari og persónligari menning.

**Fakligir eginleikar**
Vit vænta, at tú hevur viðkomandi fakligan kunnleika og arbeiðsroyndir til anleggsarbeiðir. Tað er ein fyrimunur at tú eisini hevur royndir innan betongarbeiði. Tað er ikki ein treyt at tú hevur sveinabræv. Tú skalt hava koyrikort.

**Persónligir eginleikar**
Vit ynskja, at tú ert røkin, málsøkjandi, fyrikomandi, hevur leiðsluroyndir og gongur undan í at menna tænastustøðið, dugir væl at fara við starvsfeløgum og viðskiftafólki. Tú skalt kunna arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast tilber og verður sett sambart sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Nærri fæst at vita**
Um starvið við at venda sær til Tummas Sørensen, býarverkfrøðing, tlf. 371085.

**Umsóknir**
*Saman við møguligum viðmælum, avritum av møguligum prógvum og upplýsing um royndir, skal vera Tvøroyrar Kommunu, Postboks 80, FO 800 Tvøroyri, í hendi, viðmerkt "arbeiðsleiðari til Tvøroyrar Kommunu", í seinasta lagi hósdagin 2. november 2006.*

TVØROYRAR KOMMUNA



**EYSTUROYAR DANSIFELAG**

Vit byrja dansiveturin
í Hæddini, Saltangará
fríggjakvøldið
20. oktober kl. 21.00

***Øll eru vælkomin***

***Nevndin***

**Landsfundur Fólkafloksins**

veður í Suðuroy
leygardagin 25. november 2006

Nærri verður lýst seinni

**Fólkaflokkurin**

# Dagrøktari

**til dagrøktina á Skála**

Runavíkar Kommuna søkir eftir dagrøktara at byrja 15.11.2006.

Viðkomandi skal hava áhuga og hegni at arbeiða við børnum.

Dagrøktarheimið skal verða soleiðis innrættað, at tað er gott og trygt at spæla innan- og uttandura.

Nærri upplýsingar viðvíkjandi starvinum fáast við at venda sær til dagrøktarleiðaran á tlf. 586004.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi seinast mikudagin 1. november 2006.

Runavíkar Kommuna.

**Dagrøktin á Skála**
Bryggjan 2
480 Skála

Lesið Sosialin -so eru tit við!